Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Verkætlanin at umvæla og útbyggja gamla HF-skúlan í Klaksvík

Spurningur:

1. Hvussu gongur við verkætlanini at umvæla og útbyggja gamla HF-skúlan í Klaksvík, so hann kann hýsa hølum til endur- og viðlíkahaldsvenjing, hølum til økisdeildina hjá Almannaverkinum og skrivstovum til eindarleiðarar hjá Almannaverkinum?

Viðmerking:

Hendan verkætlanin bleiv sett í gongd, meðan undirritaða sat sum landsstýrismaður í almannamálum og eftir tíðarætlanini, sum tá bleiv gjørd, skuldu hølini standa klár at taka í brúk nú í summar 2022.
Nú hava vit skjótt summar 2022 og tí hevði verið áhugavert at fingið at vita, um tíðarætlanin fer at halda.

Á Løgtingi, 17. mai 2022

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur